

Mynd: Shell

# Shell fingið loyvi til at bora eftir olju í Arktis í summar

**Jógvan Hugo Gardar**

11.05.2015 - 22:57

Oljan.fo

Amerikanskir myndugleikar hava í dag givið oljufelagnum Shell eitt treytað loyvi til at bora eftir olju í Arktis. Hetta skrivar Wall Street Journal í kvøld.

Um Shell uppfyllir treytirnar, so kann boringin byrja longu í summar. Treytirnar eru at fyritøkan tryggjar sær fleiri loyvir frá ymsum amerikanskum myndugleikum áðrenn borurin kann setast í íshavið. Shell sigur sambært Wall street Journal at tey rokna við at fáa seinastu loyvini uppá plass komandi vikurnar.

Talsmaðurin hjá Shell, Curtis Smith, sigur sambært Wall Street Journal, st tey vóna at loyvini koma uppá pláss um heilt stutta tíð. Hann leggur afturat at Shell nú er í gongd við at flyta útgerð og fólk, so byrjast kann at bora so skjótt sum til ber.

Ein av forðingunum er at umhvørvisfelagsskapir royna at fáa Seattle til at bannað Shell at brúka havnina í býnum sum útgerðarhavn í samband við royndarboringina.